mununi, her Gásadalur er partur av. Og hesaferð bar betur til!

Á bygdaráðsfundi í september mánaði í fjør fekk umsókn hennara viðhald, og nakað undan jólum kom umsíðir tað brævið, sum Gunvør hevði bíðað so leingi eftir, og sum lat dreym hennara gerast veruleiki: Byggiloyvið til eini sethús í Gásadali.

Nú var bert eftir at fara undir útgrevstur og bygging av tí nýggja heiminum til seg og børn hennara.

## Optimist

Gunvør hevur sjálvandi havt sína tíð at fyrireika seg uppá byggingina.

- Eg havi avtalað við ein her úr bygdini um at grava út fyri sethúsunum hjá mær.

- Hann er í løtuni í ferð við eitt annað arbeiði í Sørvági. So skjótt sum hann er liðugur har, fer hann at grava út hjá mær, sigur Gunvør ikki sørt spent á málinum.

Sjálv hevur – ella hevði! – Gunvør ætlanir um at flyta inn til jóla í ár. Spurningurin er tó, um hon nær tað.

- Er rokni heilt erliga ikki við at røkka tí, men ein hevur tó altíð lov til at vera optimist, sigur hon.

Sethúsini verða eini vanlig hús í einari hædd. Tey standa beint við stóra parkeringsøkið í bygdini, og hagani frá er lætt hjá gravimaskinum at koma til grundøkið.

## Má upplivast

At flyta til eina so fjarskotna bygd sum Gásadal er ikki ein avgerð, ið verður tikin yvir náttina.

Tá Gunvør, sum annars er friðarlig av natúr, byrjaði at tosa um ætlanir sínar, fekk hon nógvar viðmerkingar frá fólki. Summi skiltu hana. Onnur ikki.

- Summi hildu meg vera púra øra í høvdinum, meðan onnur søgdu: - Hví ikki tað?!

- Eg haldi bara, at ein má hava upplivað lívið her í dalinum, fyri at kunna úttala seg um tað, sigur hon avgjørd.

## Børnini gleða seg

Tá ein tekur eitt so stórt stig og haraftrat hevur fýra børn, er neyðugt at øll eru við uppá hugskotið. Tey eru úr 4 upp í 19 ár.

- Jú, eg havi sjálvandi spurt børnini, hvat tey hildu um hetta. Og tey vóru øll sera spent uppá tað, sigur Gunvør.

Hon hevur haraftrat fingið ein verson, og hava hann og dóttir hennara hinvegin søkt um grundøki heilt úti í Runavík.

- Men eg havi tó sagt við tey, at tey kunnu altíð umbestemma seg og koma higar at búgva!, sigur hon við einum brosi.



*Gunvør arbeiðir sum stuðul hjá hesi smágentuni. Í góðveðrinum hósdagin vóru tær báðar farnar ein túr vestur í Gásadal. – Hetta er eitt paradís hjá børnum, sigur Gunvør*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Ein idyllisk bygd

Tað var ein stórur dagur fyri gásadalsfólk, tá tunnilin til bygdina varð alment latin upp beint fyri jól í fjør.

Hetta gav boð um, at myndugleikarnir greitt ynsktu at hava lív í hesi bygdini, sum í síni tíð bert lá 1700 metrar frá framtíðini.

Ymiskar ætlanir hava verið frammi í bygdini, bæði innan aling og at gera eitt rættiliga stórt øki til summarhús.

Sjálv vónar Gunvør at fleiri fara at fylgja henni og vilja búseta seg í Gásadali. Og líkt er veruliga til at onnur hava sæð hetta sama. Á heimasíðuni hjá Vikublaðnum varð í farnu viku greitt frá eini familju, ið høvdu somu ætlanir sum Gunvør.

Hon veit um fleiri sum hava ætlanir um at byggja summarhús í Gásadali, millum annað fleiri fólk úr Havn sum ynskja at koma vestur higar at stressa av.

- Jú, eg vænti at tað fara at koma fleiri, sigur hon.

Fyri henni er bygdini eitt satt paradís og eitt serstakliga idylliskt stað, sum liggur burturfrá, men kortini tætt við meginøkið.

- Gásadalur er veruliga eitt stað, har ein kann slappa av og kopla fullkomuliga úr.

- Hetta er eisini eitt sera gott stað hjá børnum at vera í, slær Gunvør fast.

Serliga nógv børn eru her í bygdini um summarið. Vónað verður nú at tey nú fara at gerast enn fleiri í framtíðini – ALT ÁRIÐ!




*Grannin – Thomas Juul við Skipá – hevur júst verið og givið gæsnum her í Gásadali. Honum dámar sera væl at fáa ein nýggjan granna, men ikki so væl ætlanina at gera summarhús*

*Mynd: Jens Kr. Vang*